# broytingar



Verða ymiskt sløg av demensi býtt upp í prosentum, telir alzheimer-sjúkan 60%, vaskulerar demenssjúkur 20%, frontotemporalar demenssjúkur 10% og aðrar demenssjúkur 10%.

Eingin viðgerð finst, sum kann lekja demens, men heiluvágur er, sum eitt nú kann seinka alzheimersjúkuni.

Um læknavísundin í framtíðini fer at gera tað møguligt at koppseta fyri alzheimer-sjúkuni, veit eingin í dag.

## Mýs og menniskju

Amerikanskir granskarar í Chicago hava nýliga funnið fram til eitt enzym, sum upploysir beta-amyloid, ið er tað kyknudrepandi proteinið, sum klumpar seg um nervatræðirnar í heilanum hjá alzheimer-sjúklingum.

Enn eru hesar royndir bert gjørdar við músum. Men tað virkar – og so er bert at vóna, at mýs og menniskju hava okkurt til felags á hesum øki. Um so er, verður uppgávan at finna alzheimer-broytingar so tíðliga sum til ber og viðgera sjúkuna, áðrenn skaðin er hendur – ella so tíðliga, at "reparatións-kreft-irnar" í kyknunum kunnu náa at steðga sjúkugongdini og finna alternativar brýr millum kyknurnar, har hvør einstøk kykna hevur samband við eina rúgvu av øðr-um kyknum.

## Tey 5 a'ini

Vit kunnu liva okkum inn í støðuna hjá einum dementum við at hava tey sonevndu "5 a'ini" í huga:

Amnesi – brúkarin gloymir, hvat tað er, hann skal gera.

Apraksi – brúkarin dugir ikki at gera tað, sjálvt um hann veit, hvat hann vil.

Afasi – brúkarin dugir ikki at siga, hvat hann vil – ella fatar ikki tað, ið sagt verður við hann.

Agnosi – brúkarin veit ikki, hvat lutirnir skulu brúkast til.

Apati – brúkaranum vantar kenslur, orku, initiativ og handlikraft.

Flestu sjúklingar geva skarvin yvir, meðan aðrir royna at kýta seg tað, tey kunnu. Hetta kann vera til stóran ampa fyri umhvørvið, men at enda geva hesir eisini skarvin yvir.

Demenssjúkurnar kunnu býtast upp á ymiskan hátt, eitt nú eftir, hvar í heilanum skaðin situr, men í tí dagligu røktarskipanini er vanligt og praktiskt at býta sjúkurnar upp eftir stigum við atliti til tey sosialu evnini og røktartørvin hjá sjúklinginum.

# Professari við nýggjari røktar-filosofi um demens-sjúku

**Sálarfrøðingurin, Tom Kitwood, sum var professari við Universitetið í Bradford í Onglandi, hevur givið íblástur til at bøta um dygdina av umsorganini hjá fólki við sjúkuni, demens. Hann heldur, at tann sosial-sálarfrøðiligi parturin av røktini hevur stóran týdning fyri tann sjúka**

DEMENS
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sonevnda Alzheimer-programmið hjá Evropanevndini hevur kunnað um eina nýggja røktarfilosofi, har vektin verður løgd á, at sjúklingurin við demens er høvuðsmiðdepilin. Í mun til traditionellu medisinsku uppfatanina, har tað ræður um at minka um sjúkueyðkennini, heldur Evropanevndin, at tað í størri mun snýr seg um at taka persónin og viðurskifti hansara í álvara og at vera árvakin um kenslur, ynskir og tørvir hjá sjúklinginum.

Nýggja rákið í demensrøktini gongur nevniliga tann vegin, at tað er av størri týdningi at finna hættir at vera saman við menniskjum við demens, enn tað er at finna loysnir sum minka um sjúkueyðkennini.

Sálarfrøðingurin, Tom Kitwood, sum var professari við Universitetið í Bradford í Onglandi, var stovnari og leiðari av Bradford Dementia Group árini 1992 til 1998. Hansara serligu áhugamál vóru at framhevja, at persónurin við demens kemur í fyrstu røð. Arbeiðið hjá Tom hevur givið íblástur til at bøta um dygdina av umsorganini fyri persónum við sjúkuni, demens. Somuleiðis legði hann stóran dent á tann sosial-sálarfrøðiliga partin av røktini.

Umsorganin, sum røktarstarvsfólk veita dementum, hevur stóran týdning fyri gongdina hjá tí sjúka.

Tom Kitwood kom til ta niðurstøðu, at tann góða demens-umsorganin byggir á –

- at viðkenna persónin sum tann, hann er
- at upprunastøðið altíð eru ynskini og tørvirnir hjá tí sjúka
- at kunnleiki og áræði hansara altíð vil vera ein partur av persóninum
- at hann fær høvi at gera nakað av sær sjálvum og sleppur at greiða frá um seg sjálvan
- at tann sjúki fær sansalig upplivilsir, og at hann upplivir "hæddir" í gerandisdegnum
- at persónurin fær møguleika at hvíla seg og taka sær av løttum
- at viðurkenna tað veruliga við kenslum hansara og svara hesum aftur á einum kensluligum støði
- at kunna rúma og fevna persónin í psykologiskari merking
- at tann sjúki fær møguleika fyri at gera tað, hann fegin vil.

Demens-umsorganin skal syrgja fyri einum tryggum og góðum umhvørvi, soleiðis at tann sjúki fær mest møguligt burtur úr sínum resursum og trívist. Ikki minst skal umsorganin skapa karmarnar um, at henda støðan heldur fram.

